

# Vit søkja Navision ráðgevar

Vegna økt virksemi, bæði í Føroyum og uttanlands, verður søkt eftir dugnaligum Navision ráðgevum til deildina Business Solutions.

Arbeiðið á deildini er fjølbroytt og fevnir um allar tættir innan veiting og verksetan av MBS Navision verkætlanum, herundir

- Ráðgeving
- Menning
- Verksetan
- Brúkarahjálp

Talan er um eitt starv, har tú fært høvi at arbeiða í einum spennandi og avbjóðandi umhvørvi við dugnaligum og góðum starvsfeløgum. Vit syrgja fyri, at tú fært neyðugu útbúgvingina innan MBS Navision.

**Førleiki**
Avgerandi er, at tú hevur góðan kunnleika til og royndir við Navision ella aðrari líknandi skipan. Eisini er umráðandi, at tú hevur hegni og hug til at arbeiða við KT. Vit vænta, at tú ert útbúgvin innan roknskap og hevur royndir á hesum øki.

Tú dugir at seta teg inn í nýggj viðurskifti og at loysa uppgávur sjálvstøðugt, men hevur eisini evnir til at gerast ein virkin og góður samstarvsfelagi sum partur í verkætlanum.

**Starvstreytir**
Løn og onnur starvsviðurskifti verða avtalað í tráð við royndir og førleika.

**Umsókn**
Um tú vilt vita meira um starvið ert tú vælkomin at ringja til Snæbjørn Jacobsen á telefon 344076. Skrivlig umsókn við CV, prógvum og møguligum viðmælum verður at senda til sbj@formula.fo ella við brævi til

Formula.fo
Stiðjagøta 5
FO-100 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 5. september 2005.

**Formula.fo**

Formula.fo er Føroya størsta privata KT fyritøka við yvir 60 fólkum í starvi. Eitt av virkisøkjunum er Fíggjarstýringsloysnir, bygdar á skipanir frá Microsoft Business Solutions, herundir Navision.

www.sansir.fo

P/F Formula.fo, Stiðjagøta 5-11, Postrúm 1078, 110 Tórshavn, Tel 344000, Fax 344001, www.formula.fo

formula.fo

## NÓSI hevur føðingardag!

*Tøm Nósa í Føroya Banka og fá atgongumerki til føðingardagin!*





- Undirhald og gykl við Glotta & Gleimi,
- Angelu og Erlingi politisti
- Hoppiborg
- Teknikapping



NÓSI

www.nosi.fo

**KÍ-høllin,**
**ley. 3. sept.,**
**kl. 15 - 17.**

**Høllin á Giljanesi**
**sun. 4. sept.**
**kl. 15-17**

**Ítróttarhøllin**
**í Vestmanna**
**10. sept.**
**kl. 15 - 17.**

**Ítróttarhøllin**
**í Runavík**
**sun. 11. sept.**
**kl. 15 - 17.**

**Badmintonhøllin**
**í Tórshavn**
**ley. 17. sept.,**
**kl. 15 - 17.**

**Ítróttarhøllin**
**í Trongisvági**
**sun. 18. sept.,**
**kl. 15 - 17.**